Hans Debes Joensen

* 27. november 1913. † 15. juli 1995.

Jóhan Hendrik W. Poulsen

Jóannes Rasmussen, H.J. Joensen og Sverre Dahl. *Mynd: Kalmar*

Við Hanusi – soleiðis varð hann nevndur millum vinir og kunningar – er farin hin síðsti teirra átta, ið komu saman hin 17. desember 1952 á Jarðfrøðisavninum í Bátahøllini á Debesartrøð til at stovna Føroya Fróðskaparfelag. Á hesum sama fundi varð løgd fram fyrsta bók av Fróðskaparritum við vísindagreinum á føroyskum máli. Eitt miðið var at búgva føroyskt mál til eitt fulltikið vísindamál á øllum økjum. Annað var at leggja støði undir ein lærdómsstovn í Føroyum. Tað varð at veruleika longu hin 6. mai 1965, tá ið eitt einmælt løgting samtykti at seta á stovn Fróðskaparsetur Føroya. Væl varð yrkt, og væl varð kvøðið, og tann, sum skipaði saman við Hanusi, var

vinur hansara frá ungdómsárum, Jóannes Rasmussen jarðfrøðingur. Báðir vóru teir dyggir vísindamenn, og harafturat eldhugaðir fyri at menna og røkja føroyskt mál. Hesi bæði gingu upp í hægri eind hjá teimum og øðrum, sum av felagnum varðaðu. Og væl hevur vignast. Tað gongur sjón fyri søgn.

Mær eru minnini kær um barndómssumrini suðuri á Tvøroyri hjá ommuni og abbanum undir Heygnum, heimbygd Hanusar. Haðan fór eg summarið 1949 við pápanum suður til Sunnbiar at vitja føðingarbygd mína. Á norðurleiðini aftur vóru vit inni á gólvi hjá Hansi Debes í Vági, kunninga pápa míns frá sunnbiartíðini. Hans og faðir hansara høvdu starvast á vitanum í Akrabergi. Har var blíðskapur sum alla aðrastaðni á ferðini. Tá ið vit fóru av stað aftur, bað Hans meg fara við heilsan til Torvald Joensen fyrrverandi lærara á Tvøroyri og konu hansara Marionnu, sum hann var í skyldskapi við. Torvald, sum var ættaður av Sandi, komst eg við frá teimum mongu ferðum, vit høvdu vitjað hin undurvakra urtagarð hansara úti á Sevmýri. Hann prógvaði til fulnar, at við ídni og alski fæst Føroya mold at geva ríkiligar gávur afturímóti. Smæðin, sum eg var til, mundi eg ikki vera álvuligur at fara á gátt hjá til tað at gera ókunnufólki, men ikki var ráðiligt at leggjast oman á heilsan, ið ein var biðin at bera, so eg herdi meg í huga og fór inn hagar, ið Torvaldur búði. Hvørjum, ið møtti mær, tá ið eg kom inn, minnist eg ikki, bert tað, at Torvaldur kom út á loftslemmin, og eg stóð niðri í forstovuni og bar honum heilsanina sunnan úr Vági. Hann spurdi meg, hvør eg var, og hvussu gamal eg var. Eg var nýfyltur 15 tá um summarið. »Lítli mín«, helt hann fyri, »so gamal var einasti sonur mín, tá ið eg sendi hann til Danmarkar at ganga í skúla. Heldur tú ikki, at tað var hart av mær. Men,« tók hann aftur í orðið, »nú er hann landslækni í Føroyum. Vita, um tú kanst gera honum tað eftir.« Nakað soleiðis, minnist eg, at orð hansara fullu. Ikki mundi eg duga mær at svara nakað afturímóti, men løtan stendur mær sum meitlað í minnið – kanska tí, at mær runnu í hug tær sálarkvalir, ið gingu á meg fyri at verða sendur úr Skopun til Havnar at ganga í skúla árið fyri. Hvussu mangar ferðir tyngri mundi tað ikki vera at noyðast burtur í fremmant land, burtur frá foreldrum, vinum og øllum tí, ið ein var heimkunnigur við. Eg sigi frá hesum minnisbroti eisini tí, at tað kann geva eina hóming av tí, sum foreldrum hevur bilgst í brósti, ið hava sent einasta son sín so ungan burtur at læra. Tað hevði kanska verið hugnaligari at havt hann heima sum ein annan Jákup á Møn, men tað galt framtíð drongsins, og eisini landsins, tí framburðarhugað foreldur sóu tað sum ein tátt í frælsisstríðnum og eina treyt fyri Føroya frama, at føroyingar vórðu útbúnir til at setast í teir embætissessir, sum útlendingar høvdu sitið í. Hanus var ikki tann einasti, ið fór av stað so ungur. Aðrir vóru uppaftur yngri. Tað var tað einasta at gera tá hjá teimum, ið vildu søkja sær lærdóm. Lukkutíð fyri Føroyar, at so nógv leitaðu sær burtur í lærdómsørindum, tí hvussu var statt við mentan okkara og menning, var tað frá, sum føroyingar í útisetu við sakni, heimtrá og fosturlandsalski í huga, hava hugsað og skapað!

Ein ávøkstur av dreymum og heit-

streingjum teirra, ið burtur hava verið, er sum nevnt lærdómsstovnurin Fróðskaparsetur Føroya, ið er miðdepil fyri gransking og lærdum lestri. Hann kann skapa nøkrum av studentum okkara líkindi at nema nakað av lærdómi heima á landi, áðrenn neyðugt verður at fara burtur í lond, ella eisini at leggja ein tátt niður við tí, ið nomið er uttanlendis. Millum teirra, ið tóku hetta stóra tak, var Hanus ein hin ítasti. Tað er av sonnum einki minni enn undranarvert, at tað, sum mangur hevði dreymar um, men valla tordi at hugsa í álvara, eydnaðist hesum monnum at fremja í gerð. Her hava gingið saman dirvi, sterkur vilji, tol og seiggi, og eisini serstøk evni at fara við fólki, helst teimum, ið ráddu fyri landi og peningi. Hanus var limur í setursráðnum frá byrjan í 1965 til 1977, trý tey seinastu árini sat hann í formanssessi.

Aftur at tí krevjandi læknayrkinum – hann var landslækni í ein mansaldur, 1949-79 – gav hann sær stundir at røkja mong áhugamál, týddi ikki so lítið av bókmentum, m.a. kinverskan skaldskap (*Eystanduni,* 1976, við drúgvum og fródligum inngangi). Í fjør kom fyrsta bindið av einum meginverkinum í heimsbókmentunum, *Dekameron* eftir Boccaccio. Yrkingar hansara gjøgnum árini komu út í savninum *Í súgi um Froðbiarboða* (1991). Til tað seinasta fekst hann saman við Jóhannesi av Skarði við at týða stórverkið *Herstríð og frið* eftir Leo Tolstoi. Ikki er at gloyma alsk hansara til fagrar listir. Á ungum árum í Keypmannahavn var hann ein av undangongumonnunum at fáa stovnað Føroya listafelag, sum varð flutt heim til lands við stríðslok og nú styðjar upp undir hin glæsiliga Listaskála Føroya.

Men av øllum avrekum hansara metir undirritaði eina hægst tey megnartøk hann hevur tikið fyri mál okkara, fyrst og fremst til tess at búgva tað út sum vísindamál og yrkismál. Tey, sum lisið hava greinir Hanusar um móðurmálið, eitt nú í Búgvanum, tí valablað, sum føroyingar góvu út í Danmørk stríðsárini, varnast alsk hansara til málið og hug og vilja hansara til at ráða tí bót, har sum á vantaði. Í Búgvanum nr. 2, 16. januar 1942, er stutt grein eftir hann nevnd *Yrkismál okkara.* Av tí, at hon er greitt dømi um tað, eg nevni her, og eisini vísir frameftir, loyvi eg mær at endurgeva hana her í heild (stavsetingin dagførd):

> Vit hava frætt, at landsmenn okkara heima hava givið máli okkara tann sess, ið tað eigur. Ikki er tað javnbjóðis við fremmand mál, men *einasta almenna mál á Føroyalandi.* Hetta var so seinasti bresturin, síðan føroyingar í 1888 tóku seg saman um, at Føroyamál skuldi taka við aftur øllum rættindum sínum í Føroyum. Hetta eru stórtíðindi. Tað er ikki bert tann kenslan, ið nertur við hvønn føroying, nú hann veit, at hansara mál er lýst javnbjóðis øðrum mentaðum málum. Tað er ikki bert tað, at vit koma ongantíð aftur at síggja avbygdarmannin standa og kýta seg á tingi til láturs fyri fremmandum embætismonnum og dølskum landsmonnum – men tað er rangan av hesum stórtíðindum, vit vilja nerta við – tað er tann ábyrgdin, ið henda einmælta viðtøkan leggur á okkum ungu.
>
> Sett í verk ger henda lóg so mikið, at hon lítur okkum upp í hendur í øllum førum at bera fram hugsan okkara á egnum máli. Hvør einstakur maður ella kvinna noyðist tí, í hvussu so er, har tey koma at nerta við al-

menningin, at gerast før fyri at tala og skriva føroyskt, at læra seg føroyskt yrkismál. Øllum man tað vera skilligt, at her batar lítið at nýta tað gøtudanska, ið nú er alnýtt í hesum økjum – tílíkt mál verður tíverri fyri fyrst nýtt manna millum, men verður neyvan tolt alment av eini tjóð, ið nú hálva øld hevur barst fyri at koma sínum egna máli upp undan vesaldómi og útlendskari spillu. Tað er tí sjálvsagt, at øll tey, ið nú eru heiman og leita sær kunnleika, eisini noyðast at búgva seg út í hesum førum.

Tann ábyrgd hvílir á okkum sum føroyingar, – tí sluppu vit út at *læra,* tí at vit seinri skuldu *tæna* okkara landi og tjóð.

Taka vit nú við hesum í verki, sum landsmenn okkara hava sett í lóg, tá verða hesi jólatíðindi í royndum hetta: at vit tjóðskaparliga eru komnir á mál.

Øll orka tjóðarinnar, ið higartil hevur verið bundin í spillandi og hatskum tjóðskaparstríði verður nú at leiða inn á aðrar ræsur: tað er landastýri og tey fíggjarligu viðurskiftini, at gera livilig kor fyri tjóðina í einum frælsum Føroyum. Tað eru mál, har tað verður lættari hjá teimum ymsu flokkunum at koma á tal og meira torført hjá teimum at skúgva ábyrgdina burtur av sær, tað verða ikki kenslur og sveimandi hugtøk, men handiligir lutir, skip, fiskur, og annað, ið tá verður fremst í huga manna, viðurskifti, har hvør skilamaður í krónum og oyrum kann vita aftur, um landsins menn gjørdu beint ella skeivt. Tí er tað stórsigur, ið er vunnin.

Búgvin hevur higartil í starvsgreinum sínum roynt at vanda sær um málið, at hesi yrkisorð kundu verða alment nýtt, og ætlar hann at gera tað framvegis. Hvussu væl slíkt mál kann greiðast úr hondum, fáa vit ein varhuga av, tá vit lesa greinina um ættarfrøði, ið Chr. Matras, doktari, hevur týtt úr fremmandum máli í tí nýkomna álmanakkanum (1942). Tað er hugsandi, at føroyingar eisini uttanlendis – hvør í sínum øki – regluliga fáast við føroyskt yrkismál. Eru teimum ringir vansar á leið, halda vit okkum til at hjálpa teimum, um teir gera so væl at heita á blaðstjóran. Er tað so, at maður hevur eitthvørt uppskot til málsliga nýgerð í starvsøki sínum, eru vit fegnir, um teir vilja siga okkum frá. Tá kundi kanska at endanum komið so stórt savn, at hugsandi var um, eftir nøkrum árum at fingið út í Føroyum eina orðabók við øllum hesum máltilfari, ið so stórur tørvur er á í dagliga lívinum.

Tilelvingin til greinina man hava verið tíðindastubbi frá Jóhannesi av Skarði í Búgvanum nr. 24 árið fyri, sum ljóðar soleiðis: »*Føroyskt rættarmál.* Ein lóg, sum Løgtingið hevur viðtikið um, at føroyskt skal vera rættarmál í Føroyum, noyðist at bíða, til hon kann leggjast fram á Ríkisdegnum í Keypmannahavn.« Hvat varð av hesi lóg, er ikki rúmd at greina frá her.

At hetta, eins og annað, ið Hanus skrivaði ungur, vóru ikki tómorð, hevur hann ríkiliga sannað og sýnt í royndum: at skapa vísindagrein síni, læknafrøðini, fjøld av hóskandi og smidligum frøðiorðum, og eisini aðrari áhugagrein síni, alisfrøðini.

Fyrsta stóra stigið var føroyska úrtakið aftan í doktarritgerðini frá 1954 um bróstageving. Yrkismálsliga er henda fyrsta stóra roynd vinningur, men mær tykir, at málið er í stirvnara lagi við ov nógvum navnorðastíli og ber ikki sørt dám av at vera týtt úr enska úrtakinum frammanfyri. Tá ið Hanus

vardi ritgerðina á sinni, var fyrilestrasalurin við St. Pæturs stræti nærum fullsettur av ernum landsmonnum, ið samfegnaðust doktaraevninum. Onkur man við mær minnast, tá ið Christian Matras *ex auditorio* andmælti ymsum í málbúnanum í úrtakinum og dró okkurt fram, ið betur átti at verið orðað. Eitt, ið enn stendur mær fast í minni, var tá ið Christian segði: »Det hedder ikke *eitt ára gamal,* men *ársgamal.*« Soleiðis talar vinur, ið vomm sær!

Tá er tann lítla bókin *Mannakroppurin* (1957) øðrvísi heilskapað málsliga og stílsliga. Hetta er eyðsæð frumskrivaður tekstur, og orðalagið – við frøðiorðum – er væl valt og sambæriligt út í ytstu æsir. Sonn njóting at lesa. Aftanfyri hóma vit tann ágrýtna og vandna vísindamannin og fagurfrøðingin, sum hevur leitað víða í bókfestum og mæltum máli eftir atfeingi og við kønari hond valt burturúr tað, hann hevur hildið hóskað, og har einki fanst fyri, hegnisliga gjørt av nýggjum – men tó altíð við rót í heimligum botni. Hanus var sovorðin maður, ið las orðabøkur sær til fragdar, sum fólk flest lesa brotsmálasøgur!

Ein hin størsta yrkismálsliga sigur hevur hann vunnið við bókini *Alisfrøði* (1969). Bókina vígir hann »teimum, ið kongarnar settu«, tí hann viðurkennir, at hann stendur á herðunum á teimum, ið undan fóru í strevinum at fetta føroyska tungu. Í formælinum sigur hann frá sínum fyrstu royndum at týða partar av skúlabók í alisfrøði, men tann orðfái stórbygdardrongurin varð at viðurkenna, at hann var málloysingur, sum hann tekur til um sjálvan seg. Men tann, ið hetta verk hevur latið úr hondum, var eingin málloysingur. Henda dygga bók yður í hepnum nýgerðum og arvorðum, ið fingið hava víðkaða vísindaliga merking. Sum Christian Matras mangan hevur sagt, er tílíkt málsligt royndarvirki neyðugt – hóast ikki er væntandi, at alt kemur til lívs og í nýtslu. Her hevur høvundurin sýnt eitt dirvi, ið er undranarvert, tí er tað ikki júst smædni fyri tí vælkenda illflenninum, ið heldur mongum manni aftur, ið annars hevði hug og hegni til málbótar? Men Hanus kundi gleðast við, at mong av hugfostrum hansara hava tikið við lívi og eru undansloppin at kalla. Av handahógvi kunnu verða nevnd orð sum *alisfrøði* 'physiké', *ástøði* 'theória', *tøkni* 'tekhniké', *skilvísur* 'logikós'. Og ivaleyst eiga mong fleiri framtíðina fyri sær. Ómissandi í málrøktini á hesum øki er orðalistin, sum hann evndi til saman við Jóhannesi av Skarði, og Málstovnur Fróðskaparfelagsins gav út.

Við hini stóru *Læknabók á sjógvi og á landi* í tveimum bindum (1989) við bókini *Rúseitur – turvelvandi drøgg,* ið kom sum ein undandøttur í 1987, hevur Hanus ivaleyst gjørt sítt størsta yrkisliga og málsliga bragd. Í hesum stórverki hevur hann fyrst og fremst bygt á upprunaligt føroyskt mál um kropp og limir, sjúku og heilsuráð. Til tess at leita sær orðfeingi hevur hann pløgt ígjøgnum alt hitt stóra seðlasavnið til føroyska orðabók á Føroyamálsdeildini, og á leiðini hevur hann samtíðis bøtt og nørt um savnið. Frá honum er eisini fingið orðatilfar, sum hann í viðtalu við sjúklingar hevur loftað teimum av munni og í skundi merkt upp. Stílurin er liðiligur og ótilgjørdur. Men alt var ikki til á fólksins vørrum, og har, sum í hevur vantað, hevur hann smíðað orð og heiti, og tað í margatali. Til nýggju

føroysku orðabókina er orðtikið eitt stórt úrval av tílíkum, ið ætlast kann at hava almennan áhuga. Eitt av mongum nýggjyrðum í bókini er *eyðkvæmi* 'AIDS'. Minnist, at vit einaferð høvdu talað saman um, hvussu týðandi tað var at lata nýgjørt heimaorð líkjast hinum fremmanda í ljóði, um ikki annað so á oddanum. Einaferð seinni kom bræv við hansara kallmansligu, men ikki altíð eyðlisnu hond, skrivað í Umeå í Svøríki, har hann var staddur saman við konuni, ið starvaðist á sjúkrahúsi har eina tíð. Spurningurin var, hvussu mær dámdi orðið *eyðkvæmi,* sum hann hevði smíðað eftir teirri reglu, vit høvdu skift orð um. Eg skrivaði honum aftur, at mær leitst væl á orðið, betri gjørdist valla. Nú er tað væl kent – tíverri, kunnu vit siga – tó í harðari kapping við hitt merkingartóma enska styttingarheitið.

Herfyri bórust Føroyamálsdeildini tvær stórar rokaðar pappeskjur við orðaseðlum og øðrum málsligum fortilfari til læknabókina – eitt kærkomið íkast til orðasavnið.

Hanus hevur lagt eftir seg ríkan arv teimum, ið aftaná koma, vónandi at røkja væl og nøra um. Hann hevur verið felagi okkara, setri og landi ein góður maður. Minnið um hann goyma vit í virðing og við takklæti.